Bólkur B:

# Spania er víðari

**Fernando Morientes typti kjaftabreiða málverjan hjá Paraguay, og Suður Afrika liggur væl fyri í kappingini um at vinna seg víðari**

HM-FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*

Tað er ikki løgið, um hart rópani málverjin hjá Paraguay, Jose Luis Chilavert, er heldur kvirrari enn vanligt í hesum døgum.

Undan dystinum móti Spania hevði málverjin, sum einaferð varð mettur sum hin besti í heiminum, at Paraguay heilt víst fór at vinna á Spania. Sjálvur roknaði hann eisini við, at hann fór at skjóta tvey av málinum í sigrinum móti einum »yvirmettur sponskum liði«.

Fyrra hálvleik tóktist tað eisini soleiðis, at Paraguay hevði møguleika at vinna dystin, men hetta broyttist, tá Fernando Morientes í seinna hálvleiki kom á vøllin. Fyrst javnaði hann, og tá Chilavert seinni mistók seg, kundi hann leggja spaniólar á odda, og so kundi Hierro økja um málmet sítt á spanska landsliðnum, tá hann fram móti dystarenda kundi seta eitt brotsspak trygt í netið.

Við sigrinum hevur Spania tryggjað sær pláss millum tey seinastu 16, meðan Paraguay má seta sítt álit á, at spaniólar vinna seinasta dystin í bólkaspælinum móti Suður Afrika.

### Zuma væl fyri

Suður Afrika hevur nevnliga allar møguleikar at vinna seg víðari, eftir at teir vunnu 1-0 á Slovenia, sum var heimsenda Zlatko Sahovic fyriuttan.

Málið kom longu eftir fýra minuttum, og við tapinum eru slovenar úti úr kappingini. Javnleikur í seinasta dystinum móti Spania er hin vegin nóg mikið hjá Zuma og Co., og tað er ikki óhgsandi, at spanski venjarin fer at lata fleiri av vanliga føstu leikarunum hvíla í dystinum, og hartil kemur, at spaniólar neyvan eru alt ov áhugaðir í at hjálpa Chilavert, sum soleiðis tykist hava gjørt meira enn hálvt sjálvmál við sigurssælu rópum sínum.

**Úrslit:**
**Spania-Paraguay 3-1 (0-1)**
0-1: sjálvmál, 10
1-1: Fernando Morientes, 53
2-1: Fernando Morientes, 69
3-1: Fernando Hierro (br.), 82

**Suður Afrika-Slovenia 1-0 (1-0)**
1-0: Siyabonga Nomvete, 4

Bólkur F:

# Hevndin hjá Beckham

**Fýra ár eftir at hann varð rikin av vølli, slapp David Beckham loksins at hevna seg, tá hann við brotssparki avgjørdi dystin millum Argentina og Ongland**

HM-FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*

Nógv orð eru skrivað um hendingina, tá Kim Milton Nielsen í 1998 gav David Beckham reyða kortið í dystinum millum Argentina og Ongland. Hetta var sum so bert enn ein útgáva av vanliga dramanum, sum hoyrir til, tá hesi lond hittast, men fyri ensku stjørnuna gjørdust avleiðingarnar øgiligar.

Hann var við eitt mest hataði maðurin í Bretlandi, og tað gekk mest sum eitt ár, áðrenn fólk so spakuliga byrjaðu at fyrigeva honum hetta.

### Alt er fyrigivið

Í dag er alt fyrigivið. Fólk hava framvegis ikki gloymt ’98, men Beckham gjørdist hetjan, tá Ongland fríggjadagin vann ein sera týðandi sigur á Argentina. Málið kom eftir eitt heldur ivasamt brotsspark, tá dómarin metti, at beinini vórðu tikin undan Michael Owen.

Var ivamál um brotssparkið, so var tó eingin ivi um, at Ongland hevði sigurin uppibornan. Fyrstu 70 minuttirnar av dystinum kom Argentina snøgt sagt ikki nær námind bretska málinum. Enski press-fótbólturin hóvaði meira dólsku argentinumonnunum stak illa, og júst hetta er kanska eisini frágreðingin til, hví ein framúrskarandi fótbóltsleikari sum Juan Sebastian Veron ikki er follin til í Manchester United. Fríggjadagin skuldi hann vísa øllum Bretlandi, at hann eigur at teljast millum teir bestu, men heldur ikki hann fekk eitt beint til jørðina, og varð í hálvleikinum skiftur út.

Og málmøguleikarnir trutu heldur ikki. Owen hevði eitt skot á stongina, áðrenn hann seinni syrgdi fyri brotssparkinum, og í seinna umfarinum høvdu bæði Scholes og Sheringhamm drønandi fluktarar, sum málverjan tó fekk vart fyri.

### Larsson bjargaði svium

Úrslitið ber við sær, at onglendingar við einum javnleiki í seinasta dystinum eru vísir í at koma víðari úr deyðans bólki, sum bólkur F alt fyri eitt varð doyptur.

Nigeria hevur nevnliga einki at spæla fyri, eftir at teir taptu fyri Svøríki. Afrikanararnir løgdu seg annars á odda tíðliga í dystinum, men við tveimum málum frá stórskjúttanum hjá svium, Henrik Larsson, vendi Svøríki dystinum.

Úrslitini fríggjadagin gera annars, at Argentina er í sera trongum skóm undan seinasta umfarinum. Líkt er nevnliga til, at teir teir skulu vinna dystin á Svøríki fyri at koma víðari úr bólkaspælinum, og tað verður so undir ongum umstøðum nøkur løtt uppgáva. Sanniliga er tað ikki tað, sum argentinar høvdu roknað við undan kappingini, men eins og fleiri av hinum favorittunum í endaspælinum, so mugu teir sanna, at dystirnir eisini verða leiktir aðra staðni enn á pappírinum.

**Úrslit:**
**Svøríki-Nigeria 2-0 (1-1)**
0-1: Julius Agahowa, 27
1-1: Henrik Larsson, 35
2-1: Henrik Larsson (br.), 62

**Argentina-Ongland 0-1 (0-1)**
0-1: David Beckham (br.), 44

Bólkur G:

# Danskur hjálpardómari í fokus

**Italiumenn eru í øðini, eftir at danski linjuverjin, Jens Larsen, tvær ferðir kolldømdi mál í dystinum móti Kroatia**

HM-FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*

Tað vóru ikki hissini skoðsmál, sum italsku leikararnir høvdu at bera danska linjuverjanum, tá Italia hevði tapt 2-1 fyri Kroatia.

- Hatta var hvørki 1.- ella 2. deildardómarar. Hatta var landsbýardómarar. Nú eru vit noyddir at vinna á Mexico, men linjuverjin hevur skuldina fyri, at vit taptu handan dystin. Til eitt HM skalt tú hava teir bestu dómararnar – ikki amatørar, segði Christian Vieri millum annað, tá dysturin var lokin.

Og hann hevði kanska grein í sínum máli. Í øllum førum sýndu sjónvarpsupptøkurnar, at talan ikki á ongan hátt var um rangstøðu, tá hann helt seg hava lagt Italia á odda, og tað má eisini metast sum ivasamt, um avgerðin var røtt, tá Larsen í seinastu minuttunum kolldømdi eitt mál hjá Inzaghi, tí hesin hevði togað ov nógv í verjuleikara, tá teir dystaðust um bóltin.

Hóast hetta, so tóktist Italia at hava tamarhald á dystinum, tá Vieri skeyt sítt áttanda mál í sjey HM-dystum, men við tveimum málum innan fimm minuttir koppaðu kroatar øllum á høvdinum, og so hjálpti tað lítið, at Italia fleiri ferðir var heilt nær við at skora.

### Trý hava møguleikan

Í seinasta dystinum skal Italia spæla móti Mexico, og eftir at hesir vunnu á Ecuador bendir alt á, at vinnur Italia ikki hendan dystin, mugu teir takka fyri seg.

Ecuador hevur nevnliga einki at spæla fyri í dystinum móti Croatia, eftir at teir eisini taptu næsta dystin. Delgado hevði annars lagt Ecuador á odda, men við einum máli hvørji megin steðgin syrgdi Mexico fyri, at teir fingu øll trý stigini og harvið ein fyribils oddasess.

Best sær tað kanska út hjá Kroatia. Vinna teir við tveimum málum á Ecuador eru teir púrasta vísir í at vinna seg víðari úr bólkaspælinum.

**Úrslit:**
**Italia-Kroatia 1-2 (0-0)**
1-0: Christian Vieri, 56
1-1: Ivica Olic, 73
2-1: Milan Rapajc, 77

**Mexico-Ecuador 2-1 (1-1)**
0-1: Augustín Delgado, 5
1-1: Jared Bogetti, 28
2-1: Gerardo Torrero, 57




*Christian Vieri og liðfelagarnir á itlaska liðnum vóru í øðini inn á danska linjuverjan, sum kolldømdi tvey mál, tá Italia tepti 2-1 fyri Kroatia*
*Mynd: Reuters*



Bólkur C:

# Undirhaldandi javnleikur

**Costa Rica og Turkaland spældu kanska mest undirhaldandi, og Brasilia hevur tryggjað sær víðari luttøku í kappingini**

HM-FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*

Enn stendur tað púrasta opið, hvørt tað verður Turkaland ella Costa Rica, sum vinnur seg víðari úr bólki C saman við Brasilia.

Ein avgerð var at hóma, tá londini bæði dystaðust sunnudagin, og málmøguleikarnir trutu í øllum førum ikki. Serstakliga í seinna hálvleiki var talan um ein lívligan dyst, og eftir at Turkaland hevði lagt seg á odda, setti Costa Rica eitt satt ódnarveður í gongd oman móti turkiska málinum. Talan gjørdist tó bert um einsamalla málið, sum Winston Parks skeyt stutt fyri leiklok, og úrslitið merkir, at tað enn er púrasta opið, hvat av londunum skal víðari úr bólkaspælinum.

### Farvæl til Kina

Tað hevur Brasiliga – annars sum einasti av sonevndu favorittum – longu tryggjað sær, eftir at teir leygardagin vundu burtur úr kinesarunum. Roberto Carlos legði fyri, tá hann eftir fimm ár uttan landsliðsmál langaði fríspark beinleiðis í málið. Hetta var fyrsta mál hansara á landsliðnum, síðani hann undan HM kappingini í 1998 sendi heimsgitna fríspark sítt úr 30 metrum í kassan móti Fraklandi.

Rivaldo, Ronaldinho og Ronaldo skutu hini trý málini, sum staðfestu, at Kina - sum væntað - noyðist at siga farvæl til endaspælið á hesum sinni.

**Úrslit:**
**Brasilia-Kina 4-0 (3-0)**
1-0: Roberto Carlos, 15
2-0: Rivaldo, 32
3-0: Ronaldinho (br.), 45
4-0: Ronaldo, 55

**Costa Rica-Turkaland 1-1 (0-0)**
0-1: Emre Belozoglu, 56
1-1: Winston Parks, 86

Bólkur H:

# Søguligur sigur

**Japanar vunnu fyri fyrstu ferð í HM høpi, tá Russland var mótstøðuliðið sunnudagin, og meðan alt Japan nú er á gosið, er sannur ruðuleiki í Russlandi**

HM-FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*

Arsenal leikarin, Junichi Inamoto, skrivaði japanska fótbóltssøgu, tá hann við brotssparki syrgdi fyri fyrsta sigrinum hjá Japan í HM-endaspæli yvirhøvur.

Japanski sigurin á Russlandi var annars ein góð uppflylgjan av óvæntað dygga avrikinum í fyrsta dystinum móti Belgia, og nú stendur Japan við sera góðum kortum í royndunum at koma víðari úr kappingini.

Japanar skulu bert hava eitt stig í seinasta dystinum ímóti Tunis, sum verður mett sum veikasta liðið í bólkinum, og við stuðlinum frá heimaáskoðarunum og góða spælinum, sum liðið hevur sýnt, tykist hetta á ongan hátt at vera nøkur ógjørlig uppgáva.

### Rok í Russlandi

Meðan japanar frøddust um sigurin, var ruðuleikin í Moskva øgiligur, tá úrslitið varð veruleiki.

Eini 10.000 fólk vóru savnaði nærhendis Reyða Torginum, har dysturin varð vístur á stórskíggja, og hesi toldu ikki, at Russland skuldi verða fyrsta landið, sum mátti lúta fyri Japan. Eldur varð settur á bilar, handilsvindeygu vórðu knúst, og eitt fólk lat eisini lív í rokinum, sum íkom eftir dystin.

Enn er tó ikki alt mist hjá Russlandi. Vinna teir seinasta dystin á Belgia koma teir víðari úr bólkaspælinum.

**Bólkur H**
**Japan-Russland 1-0 (0-0)**
1-0: Junichi Inamoto (br.), 51

# Komandi dystir

FÓTBÓLTUR

**1. deild menn**
**16.06** B36-EB/Streymur
Eiler Rasmussen
**16.06** NSÍ-TB
Birgir Sondum
**16.06** VB-B68
Suni Johansen
**16.06** GÍ-KÍ
Dagfinn Olsen
**16.06** Skála-HB
Páll Augustinussen

**2. deild menn**
**15.06** KÍ-B71
Tummas Pauli Olsen
**15.06** FSV-B36
Dia Lamhauge
**15.06** HB-Sumba
Rúni Gaardbo
**15.06** VB-ÍF
Johann Krogh
**15.06** NSÍ-LÍF
Georg Rasmussen

**3. deild menn**
**16.06** B36-AB
Laurits í Króki
**16.06** FSV-TB
Jan E. Glyvradal
**16.06** ÍF-B68
Jonhard Hansen
**16.06** GÍ-B71
Jan Gardar
**16.06** Royn-HB
Eyðun Kjærbo

**1. deild kvinnur**
**16.06** KÍ-HB
Berint Andreasen
**16.06** GÍ-B68
Óli Samuelsen

**Kappingin um løgmanssteypið**
**13.06** HB-VB
Birgir Sondum
**13.06** B68-NSÍ
Lassin Isaksen

**Steypakappingin kvinnur**
**12.06** B71-HB
Kristoffur Vidtfeldt
**12.06** B36-KÌF
Pætur Clementsen

**HM í fótbólti**
**11.06 7.30**
Danmark-Frakland
**11.06 7.30**
Senegal-Uruguay
**11.06 12.30**
Cameroon-Týskland
**11.06 12.30**
Saudi Arabia-Írland

# HM-Støður

**Bólkur A**

| | | d | v - j - t | v mál | t mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | Danmark | 2 | 1 - 1 - 0 | 3 | 2 | 1 | 4 |
| 2 | Senegal | 2 | 1 - 1 - 0 | 2 | 1 | 1 | 4 |
| 3 | Uruguay | 2 | 0 - 1 - 1 | 1 | 2 | -1 | 1 |
| 4 | Frakland | 2 | 0 - 1 - 1 | 0 | 1 | -1 | 1 |

**Bólkur B**

| | | d | v - j - t | v mál | t mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | Spania | 2 | 2 - 0 - 0 | 6 | 2 | 4 | 6 |
| 2 | Suður Afrika | | 2 1 - 1 - | 0 | 3 | 2 | 1 |
| 4 | | | | | | | |
| 3 | Paraguay | 2 | 0 - 1 - 1 | 3 | 5 | -2 | 1 |
| 4 | Slovenia | 2 | 0 - 0 - 2 | 1 | 4 | -3 | 0 |

**Bólkur C**

| | | d | v - j - t | v mál | t mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | Brasilia | 2 | 2 - 0 - 0 | 6 | 1 | 5 | 6 |
| 2 | Costa Rica | 2 | 1 - 1 - 0 | 3 | 1 | 2 | 4 |
| 3 | Turkaland | 2 | 0 - 1 - 1 | 2 | 3 | -1 | 1 |
| 4 | Kina | 2 | 0 - 0 - 2 | 0 | 6 | -6 | 0 |

**Bólkur D**

| | | d | v - j - t | v mál | t mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | Suður Korea | | 1 1 - 0 - | 0 | 2 | 0 | 2 |
| 3 | | | | | | | |
| 2 | USA | 1 | 1 - 0 - 0 | 3 | 2 | 1 | 3 |
| 3 | Portugal | 1 | 0 - 0 - 1 | 2 | 3 | -1 | 0 |
| 4 | Póland | 1 | 0 - 0 - 1 | 0 | 2 | -2 | 0 |

**Bólkur E**

| | | d | v - j - t | v mál | t mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | Týskland | 2 | 1 - 1 - 0 | 9 | 1 | 8 | 4 |
| 2 | Cameroon | 2 | 1 - 1 - 0 | 2 | 1 | 1 | 4 |
| 3 | Írland | 2 | 0 - 2 - 0 | 2 | 2 | 0 | 2 |
| 4 | Saudi Arabia | | 2 0 - 0 - | 2 | 0 | 9 | -9 |
| 0 | | | | | | | |

**Bólkur F**

| | | d | v - j - t | v mál | t mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | Svøríki | 2 | 1 - 1 - 0 | 3 | 2 | 1 | 4 |
| 2 | Ongland | 2 | 1 - 1 - 0 | 2 | 1 | 1 | 4 |
| 3 | Argentina | 2 | 1 - 0 - 1 | 1 | 1 | 0 | 3 |
| 4 | Nigeria | 2 | 0 - 0 - 2 | 1 | 3 | -2 | 0 |

**Bólkur G**

| | | d | v - j - t | v mál | t mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | Mexico | 2 | 2 - 0 - 0 | 3 | 1 | 2 | 6 |
| 2 | Italia | 2 | 1 - 0 - 1 | 3 | 2 | 1 | 3 |
| 3 | Kroatia | 2 | 1 - 0 - 1 | 2 | 2 | 0 | 3 |
| 4 | Ecuador | 2 | 0 - 0 - 2 | 1 | 4 | -3 | 0 |

**Bólkur H**

| | | d | v - j - t | v mál | t mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | Japan | 2 | 1 - 1 - 0 | 3 | 2 | 1 | 4 |
| 2 | Russland | 2 | 1 - 0 - 1 | 2 | 1 | 1 | 3 |
| 3 | Belgia | 1 | 0 - 1 - 0 | 2 | 2 | 0 | 1 |
| 4 | Tunis | 1 | 0 - 0 - 1 | 0 | 2 | -2 | 0 |

## Máltindurin, HM

| | | |
|---|---|---|
| Miroslav Klose | Týskland | 4 |
| Jon Dahl Tomasson | Danmark | 3 |
| Christian Vieri | Italia | 3 |
| Rivaldo | Brasilia | 2 |
| Ronaldo | Brasilia | 2 |
| Junichi Inamoto | Japan | 2 |
| Fernando Hierro | Spania | 2 |
| Fernando Morientes | Spania | 2 |
| Henrik Larsson | Svøríki | 2 |